# Vit hava tørv á TÆR!

Føroysk lesandi fara nú at fáa arbeiðstilboð úr Føroyum umvegis teldupost. Hetta fer at styrkja sambandið millum føroyska arbeiðsmarknaðin og tey, sum lesa uttanlands

Fert tú uttanlands at lesa, hoyrir tú ikki eitt kis frá føroyska arbeiðsmarknaðinum. Tú veist einki um hvørjar møguleikar tú hevur at fáa arbeiði, tá tú kemur aftur, og hvør tørvurin á føroyska arbeiðsmarknaðinum er.

Samstundis fært tú fleiri tilboð um at søkja arbeiði frá ymsum útlendskum fyritøkum, ið málrættað leita eftir fólki at nøkta júst teirra tørv. Tað hevur tí verið ilt hjá føroyskum lesandi at síggja, hvat tey skulu koma heimaftur til. Men hetta fer nú at broytast.

### Yrkistænastan

Á umsóknarblaðnum um ferðastuðul frá Stuðulsstovninum er nú komin ein nýggjur teigur.

"Eg ynski at fáa teldupostar frá Stuðulsstovninum, ið vinnulív, tað almenna ella áhugabólkar senda okkum" Og so skal veljast ja ella nei.

Stuðulsstovnurin hevur samband við allar føroyingar, ið lesa uttanlands og sum søkja um ferðastuðul, og í tí sambandi hevur hann eisini allar teldupostadressurnar hjá føroyskum lesandi uttanlands.

Føroyskar fyritøkur –bæði almennar og privatar, kunnu hereftir venda sær til Stuðulsstovnin og biðja hann senda teldupostar út til ein ávísan bólk av lesandi. Sosialurin kundi til dømis biðið Stuðulsstovnin sent øllum journalistlesandi mail um, at nú var starv leyst at søkja á Sosialinum – ella onnur viðkomandi boð, ið kundu verið áhugaverd og spennandi.

Skipanin við yrkistænastuni verður ein fyrimunur bæði fyri tey lesandi og fyri vinnulívið.

Við at velja ja, fært tú sostatt ein einastandandi møguleika at fylgja við í, um nakað forvitnisligt hendir her heima á júst tínum øki.

*Eydna Skaale*
*eydnaskaale@hotmail.com*



# Hvør skal gjalda títt skúlagjald?

Høgu skúlagjaldini uttanfyri norðurlond hava higartil verið goldin av Stuðulsstovninum – men nú er tað broytt. Bæði skotski stuðulsstovnurin SAAS og SU veita nú eisini føroyingum skúlagjald í ávísum førum, og tá kann Stuðulsstovnurin bert gjalda munin millum skúlagjaldið og tað útlendsku stuðulsstovnarnir gjalda. Tað er tí týdningarmikið at kanna hvør skal gjalda títt skúlagjald – og at søkja sum skjótast!

Leingi hevur Stuðulsstovnurin verið tann einasti stovnurin, ið hevur goldið fyri skúlagjaldini hjá føroyingum. Men soleiðis er ikki longur. Føroyingar hava nú rætt til at søkja bæði SU og SAAS, sum er skotski stuðulsstovnurin, um skúlagjald. Og í teimum førunum, tá teir taka við, hevur Stuðulsstovnurin ikki heimild at rinda. Fyri ikki at verða fangaður á skeiva beininum, er tí týdningarmikið, at tú sum skjótast kannar, hvør skal rinda títt skúlagjald, og at tú sum skjótast sendir eina umsókn avstað. Viðgerðartíðin er nevniliga long.

### Skotland stuðlar føroyingum

Í 2007 varð avgjørt, at allir føroyingar, sum lesa bachelor útbúgvingar í Skotlandi, skulu fáa kostnaðin rindaðan frá SAAS. Ávísar masterútbúgvingar verða eisini rindaðar av sama stovni, og tá kann Stuðulsstovnurin bert gjalda munin millum skúlagjaldið og tað útlendsku stuðulsstovnarnir gjalda. Ætlar tú tær at lesa Master í Skotlandi, er tí týdningarmikið at kanna um stuðul verður latin til júst tína útbúgving. Tað gert tú á heimasíðuni: www.saas.gov.uk/student_support/special_circumstances/postgrad_list.htm. Um útbúgvingin er á listanum, skalt tú seta teg í samband við skúlan, tú ætlar tær á, og kanna, um hann er SAAS góðkendur. Letur SAAS ikki stuðul til tína útbúgving, skalt tú søkja Stuðulsstovnin.

**Kanna eisini:**
**www.saas.gov.uk**

### SU nýggja tænastu

Frá á heysti í 2008 veitir SU eisini skúlagjald til lesandi á ávísum útbúgvingarstovnum uttanlands. Fyri at kanna um tín útbúgving er ein av hesum, far inn á www.su.dk og trýst á udlandsstipendium í vinstru síðu. Um tín útbúgving og útbúgvingarstað er á einum av teimum fýra listunum á heimasíðuni (Universitetslisten, Kulturministeriets liste, Undervisningsministeriets liste og Samarbejdsaftalelisten), skalt tú søkja SU um skúlagjaldið. Møguleiki er tó eisini at søkja, sjálvt um tín útbúgving ella útbúgvingarstovnur ikki er á listanum. Um SU ikki rindar ella bert rindar ein part av skúlagjaldinum kanst tú søkja Stuðulsstovnin um tann partin, ið ikki fæst frá SU.

*Eydna Skaale*
*eydnaskaale@hotmail.com*

**Meiri fæst at vita á:**
**www.su.dk**
**www.udlandsstipendium.dk**
**www.ask.fo**
**www.studul.fo**

## Minst til...

- **Øll, ið ætla sær út um Norðurlond at lesa, skulu søkja um SU-góðkenning.**
- **Um tú ætlar tær út um Norðurlond at lesa, so søk um SU-góðkenning av útbúgvingini ella útbúgvingunum skjótast gjørligt – helst her og nú!!!**
- **Viðgerðartíðin er ofta ógvuliga long – upp til 4 mánaðir.**
- **SU-góðkenningarskjalið finst á heimasíðunum *www.su.dk*, *ww.ask.fo* og *www.studul.fo***